# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# BRÚKARIN HEVUR EINKI VAL

Soleiðis sum bústaðarvirðurskiftini eru skipað í Føroyum, so hava bankarnir so ómetaliga nógv at siga fyri okkara privata búskap. Sum vanligur sethúsaeigari stendur tú púra hjálparleysur, tá tú frættir, at bankin hækkar rentuna. Politikararnir hava eins lítið og vit leikfólk at siga til hetta veldi bankanna.

Í síðstu viku fingu vit so tey gleðiboð, at BankNordik lækkaði rentuna á sethúsalánum frá 5,8 til 4,75 prosent. Tað er sjálvandi at gleðast um, men hetta er sum at vinna í lottaríinum, tí vit hava onga ávirkan á gongdina. Hóast fíggjarmálaráðharrin alment legði trýst á BankNordik um at lækka rentuna fáar dagar frammanundan, so tvíheldur bankastjórin um, at hetta hevði als onga ávirkan.

Seinnu árini hava bankarnir lagt nógv fyri til tess at fáa fólk at siga upp síni sethúshúsalán fyri ístaðin at taka upp donsk realkreditlán. Hetta hevur verið sera áhugavert, tí rentan er lág, og bankarnir hava helst havt tørv á gjaldføri.

Men hetta hevur kanska ikki sama áhuga hjá bankunum í dag. Í øllum førum hevur BankNordik hækkað rentuna á realkreditlánium – tí partinum, sum bankin skal hava – úr 1,7 prosentum til 1,9. Spurningurin er so, hvønn týdning brúkarin skal leggja í tað, at bankin lækkar rentuna á egnum lánum og hækkar rentuna á realkreditlánum. Endamálið er vælsaktans, at nú vil bankin sjálvur sleppa at læna út pengar, ella...?

Spurningurin um føroyskan realkreditt hevur verið reistur fleiri ferðir. Húsalánsgrunnurin skuldi einaferð verða ein slík almenn loysn at kappast við bankarnar, men tann grunnurin kann ikki longur veita sethúsalán.

Spurningurin er, hvør rætta loysnin er, og hvør kann tryggja eina sunna kapping á sethúsalánsmarknaðinum. Kapping hava vit so ikki í dag, vit hava eitt duopol, sum ofta er verri enn monopol, tí tað stendur nógv sterkari.

Eitt faktum er tað eisini, at bankarnir eisini sita á sethúsasølunum,



og tey bæði tryggingarfeløgini eru eisini samantvinnað við báðar bankarnar. Rákið er greitt, teir báðir bankarnir fáa alsamt størri og stekari tak á brúkarunum.

Vit vildu ynskt, at støðan var øðrvísi: At vit høvdu veruliga kapping, at gjøgnumskygni var størri, og at vit ikki fingu so nógv brúkaragjøld fyri alt tað arbeiði, sum vit sum kundar nú gera fyri bankan við heimabankanum.

Høvdu vit veruliga kapping, og slapp brúkarin at velja, so bar hetta snøgt sagt ikki til.

**» Saka kapping um at veita bílig sethúsalán**

# EB/Streymur hevur stovnað nýtt felag

Nýggja limafelagið, sum eisini eitur EB/Streymur, skal yvirtaka øll rættindi og allar skyldur hjá felagsdeildini EB/Streymur, sum EB og Streymur hava havt í felag síðani 1993.

Á fundi í kvøld vóru um 100 fólk møtt upp at seta á stovn nýtt limafelag, sum skal standa fyri rakstrinum av EB/Streymi. Sostatt fer EB/Streymur í sínum gamla líki í søguna, men kortini heldur fram sum nýtt limafelag við sama navni.

Frammanundan var EB /Streymur heitið á felagsdeildini, fótbóltsfeløgini EB og Streymur hava havt í 1993, og sum hevur tikið sær av fótbóltinum hjá feløgunum báðum. Men nú er EB/Streymur limafelag, skipað á sama hátt sum flestu ítróttarfeløg kring landið.

Í innbjóðingini til fundin stóð millum annað, at »øllum kunnugt hevur verið nakað av turbulensi kring EB/Streym í seinnastuni. Hetta ger tað upp aftur meira neyðugt, at øll í økinum standa saman um felag okkara, so vit kunnu koma styrkt burtur úr støðuni.«



Fyri at laga EB/Streym til framtíðina, varð eitt nýtt limafelag hildið at vera besta loysnin, so tað kundi taka sær av rakstrinum av EB/Streymi. Nýggja felagið yvirtekur øll rættindi og allar skyldur hjá gomlu felagsdeildini EB/Streymur.

Nevndin í EB/Streymi er nú henda: Rólant Højsted, formaður, Anvør Zachariasen, næstformaður, Signar í Homrum, skrivari, Ingolf Joensen, kassameistari, og Guðrun Ejdesgaard, nevndarlimur. Tiltakslimir eru Una Højsted og Sjúrður Vesturdal Nielsen.

Flestu av hesum fólkum hava annaðhvørt sitið í nevnd ella verið knýtt at EB/Streymi sum álitisfólk á ymsum økjum, so hóast EB/Streymur nú er umskipað til limafelag, eru tað stórt sæð somu fólk, ið sita við borðendan í nýggja felagnum.



**» Uni Arge loypir bara undan**

ROLF GUTTESEN
KJAK Á SÍÐU 27



**» Sparingar í sjúkrahúsverkinum**

ÓLI MIKKELSEN
KJAK Á SÍÐU 27

# Jógvan Zachariassen doktari



Hósdagin 10. februar vardi Jógvan Zachariassen doktararitgerð sína við Dallas Theological Seminary í Texas í USA.

Ritgerðin ber heitið: "The Theology of Music". Ritgerðin viðger sambandið millum tónleik og gudfrøði og hvussu ein tónleikari skal fyrihalda seg til tónleik og trúarlív í síni egnu mentan.

Vegleiðarar hjá Jógvani vóru Dr. Oscar Lopez og Dr. Ronald Man, báðir professarar í gudfrøði og tónleiki. Afturat teimum sótu í dómsnevndini Dr. Scott Barfoot, Head of Doctoral Department á Dallas Theological Seminary og tveir aðrir professarir.

Eitt serligt við hesari verjuni var, at Jógvan vardi ritgerðina úr Føroyum, verjan fór nevniliga fram umvegis video conference call á Skype. Ein dómari sat í Washington, ein í Oklahoma, ein í Houston og tveir í Dallas, Texas, og Jógvan í Føroyum. Jógvan er samkomuleiðari í Lívdini í Hoyvík.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*